NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Fonn Flog í nýggjum hølum

Skal tú veita eina dygdargóða tænastu, mást tú eisini hava góð høli at bjóða bæði starvsfólkum viðskiftafólkunum, sigur Leivur Fonn, sum fegnast um nýggju, stóru hølini í miðbýnum í Klaksvík

Fríggjadagin var móttøka í nýggju hølunum hjá Fonn Flog í Klaksvík. Ferðaskrivastovan heldur nú til í hjartanum í miðbýnum

MÓTTØKA
Anna V. Ellingsgaard
anna@sosialurin.fo

– Fyrr ella seinni verður tú noyddur at gera upp við teg sjálvan, um tú bara ætlar at halda fram í tí smáa, ella um tú ætlar at fylgja tíðini og nýggju krøvunum hon setur, sigur Leivur Fonn, nú ferðaskrivstovan er flutt í størri høli í miðbýnum í Klaksvík. Leivur leggur afturat, at tey altíð hava gingið upp í fyritøkuna av fullum hjarta, og við økta virkseminum var tað tí náturlig eisini at víðka um hølini.

Rætta løtan

Hesi 12 árini, síðani Leivur og Ásla Fonn fóru undir at reka ferðaskrivstovu, hava tey hildið til í rættiliga trongligu hølunum í Nólsoyar Pálsgøtu 28. Hølini høvdu sínar fyrimunir, har var hugnaligt, og so lá skrivstovan beint við ferjuleguna. Men Leivur dylur ikki yvir, at tankin um, at um tvey ár kemur ongin ferðsla frá Dúgvuni longur, eisini var ein av orsøkunum til at tey fluttu nærri miðbýnum.

– Men tað var avgjørt ikki einasta orsøkin. Vit hava leingi verið greið yvir, at gomlu hølini vóru ov tronglig, so tað hevur bara verið ein spurningur um tíð og røttu løtuna. Og tann løtan kom nú, hølini í Biskupsstøðgøtu gjørdust tøk, sigur Leivur.

Persónliga tænastu

Og starvsfólk og viðskiftafólk hjá Fonn Flog kunnu neyvan hugsa sær betri høli. Ferðaskrivstovan fær illa ligið betri fyri og við næstan 100 ferðmetrum meir at ráða yvir, er eisini vorðið pláss fyri borðum og stólum, har viðskiftafólk kunnu sita og kaga í teir mongu ferðafaldarnar og droyma seg burtur í onnur lond.

Leivur leggur dent á, at tað altíð hevur verið drívmegin í fyritøkuni at geva hvørjum einstøkum viðskiftafólki eina so góða og persónliga tænastu, sum gjørligt.

– Tað kanst tú eisini framvegis gera í telefonini ella í bræví, sjálvt um hølini eru tronglig, men tað ávirkar trivnaðin hjá starvsfólkunum. Og tað ber sjálvsagt illa til at veita eina persónliga tænastu til tey, sum støkka inn á gólvið, um tey skulu standa kroyst upp móti hvørjum øðrum. Okkum hevur altíð dámað serliga væl, at fólk koma inn á gólvið til eitt prát, og tað verður framvegis eitt av okkara eyðkennum. So nú gleða vit okkum til at kunna bjóða uppaftur fleiri at støkka inn á gólvið, sigur Leivur, sum leggur afturat, at tað ikki minst er teimum fryntligu og dugnaligu starvsfólkunum fyri at takka, at talið á viðskiftafólkum er økt so nógv.

Onkur av teimum, sum vóru komin at ynskja Fonn Flog tillukku við nýggju hølunum, nýttu høvið at drekka ein kaffimun uttandura í góðveðrinum fríggjadagin

Karsten Hansen 60 ár

Í dag, mikudagin 18. august, fer Karsten Hansen í Klaksvík um tey 60. Dagurin verður hildin á Hotel Norð á Viðareiði, sum yngsta dótturin og maðurin eiga og reka. Karsten varð fyrstu ferð valdur inn á ting fyri Tjóðveldisflokkin í Norðoyggjum 20. januar í ár. Frammanundan hevði hann verið landsstýrismaður í figgjarmálum, síðani fullveldissamgongan sá dagsins ljós í mai í 1998.

Tað fyrstu tíðina var tað fullveldismálið og samráðingarnar við danir, ið tað hoyrdist mest til. Men sum tíðin leið, og tað ikki tók seg akkurát soleiðis upp, sum samgongan hevði ætlað, gjørdist fíggjarmálaráðharrin, sum ikki frammanundan hevði roynt seg í landspolitikki, tyngsti landsstýrismaðurin hjá Tjóðveldisflokkinum. Tað leikaði mangan hart á. Bæði tá ið samgongulimir vildu hava meiri úr kassanum, og tá ið talan var um sáttmálasamráðingar við fakfeløgini.

Karsten er ættaður úr Søldarfirði. Foreldrini vóru Andrea og Frederik Hansen. Tey vóru bæði úr Leirvík, og Karsten er yngstur av seks systkjum. Mia var elst. Hon búði í Danmark og doyði ung av sjúku. Hini eru Jóannes, Hanus, Annelena og Kristian, sum øll búgva í Havnini og so Karsten.

Blaðungur fór hann til skips og arbeiddi eisini eitt skifti í handli, áðrenn hann miðskeiðis í seksti árunum fór til Keypmannahavnar at læra til løgreglumann. Meðan hann var undir útbúgving, hitti hann Gull-Britt, sum er ættað úr Keypmannahavn. Tey giftust og settu búgv á Argjum, tá ið Karsten gjørdist løgreglumaður í Havnini. Í 1975 fluttu tey til Klaksvíkar, har Karsten hevði fingið starv sum støðleiðari, og í 1985 gjørdist hann sýslumaður í Norðoyggjum. Gull-Britt og Karsten búgva í húsunum, sum J. F. Kjølbro bygdi á Biskupsstøð, og tey gjørdist rættuligir klaksvíkingar. Í Klaksvík hava tey funnið sær nógvar vinir – ikki minst í samkomuni í Betesda, sum tey eru komin í, síðani tey fluttu norður. Gull-Britt og Karsten eiga fýra børn: Heidi og Thorbjørn búgva í Klaksvík, Frederik býr í Leirvík, og Mirjam býr á Viðareiði. Barnabørnini eru 11 í tali. Stutt eftir, at hann var komin til Klaksvíkar, keypti Karsten hús og jørð í Mikladali. Har norðuri hava tey verið rættuliga nógv.

Karsten er óræddur maður. Hann hevur fingið heiðursmerki fyri at hava framt serliga vandamikið bjargingarbragd. Hann er altíð væl hýrdur, og á politiska pallinum hevur tað verið eyðsýnt, at hann er rættuliga treiskur.

At Karsten altíð hevur verið tjóðveldismaður og politiskt áhugaður hevur hann so at siga arvað frá pápanum. Frederik Hansen var nevndarlimur í Føroya Fiskimannafelag, limur í Nes sóknar kommunu í mong ár og formaður í fleiri ár, og hann var tingmaður fyri Tjóðveldisflokkin í Eysturoy 1954-1970.

Karsten hevur fingist nógv við politikk og fakfelagsarbeiði. Eitt nú var hann formaður í Føroya politistafelag 1973-1984, og eitt skifti var hann rakstrarleiðari á 14. september, og tá segðist Fjúrtandi at hava tað gott.

Í 1988 varð Karsten valdur í Klaksvíkar býráð fyri Tjóðveldisflokkin. Har sat hann, inntil hann gjørdist landsstýrismaður. Frá 1993 og til 1998 var hann næstformaður í býráðnum. Karsten umboðaði Klaksvíkar býráð í IRF 1993-1998, og har var hann nevndarformaður, tá ið tað ikki stóð so væl til, og tað var neyðugt at sýna ábyrgd og taka stór tøk.

Fríggjadagin í síðstu viku var fráfaringarsamkoma fyri Karsteni Hansen á Politistøðini í Klaksvík. 1. september fer hann úr sýslumansstarvinum. Tá fer tíðin at verða brúkt til familjuna, politiska arbeiðið og øll hini mongu áhugamálini, sum Karsten er upptikin av.

Dagurin

18. august. Agapetus, deyður umleið ár 300. Ein 15 ára gamal drongur, sum var tikin av døgum fyri kristnu trúgv sína.

Vinn ferð til Old Trafford

Dreymaferð til dreymanna leikvøll

Dysturin verður leiktur á Old Trafford mánakvøldið, 20. september. Flogið verður beinleiðis við Atlantic Airways til Manchester, har steðgað verður í tveir dagar. Gist verður á 4-stjornaðum hotelli, og eisini verður skipað fyri rundferð á Old Trafford.

Meira fæst annars at vita um túrin á www.mb.fo

FERÐIRTAFRENT

Í mannamunni hevur Old Trafford í mong ár borið heitið, Theatre of Dreams. Og tað er eingin loyna, at tað eisini er dreymurin hjá mongum at síggja the Mighty Reds spæla á heimavølli.

Saman við MB-Tours hevur tú nú møguleikan til at fáa dreymin uppfyltan. Tann 20. september er nevnliga ein av ársin dystum í Premier League, tá Manchester United tekur ímóti Liverpool. MB-Tours skipar í hesum sambandi fyri ferð til dystin, og saman við Sosialinum lutar MB-Tours eisini eina ferð fyri tvey burtur til dystin.

Fyri at vera við í kappingini um dreymaferðina krevst bara, at tú tekur lut í kappingini, sum Sosialurin skipar fyri. Kappingin um hetta fer av bakkastokki í dag og heldur so fram tey nníggju komandi bløðini.

Hvørja ferð eru tríggir spurningar, sum hava eitthvørt við hesi bæði mætu ensku feløgini at gera. Alt, sum tú skalt gera, er at svara spurningunum, so hvørt hesir eru í blaðnum, og síðani senda teir tíggju svarleparnar inn til okkara. Brævbjálvar við seðlunum skulu merkjast "kapping", og skulu sendast til:
Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn

Saman við svarlepunum skulu vit hava upplýsingar um navn, bústað og tlf. nummarið hjá tær. Drigið verður um vinningin mánadagin 30. august, og mugu seðlar til kappingina tí vera okkum í hendi í seinasta lagi leygardagin, 28. august.

Klipp henda spurnarlepa út, og send til Sosialin

1. Við ikki færri enn 346 málum fyri besta liðið, er hesin walisin tann mest skorandi nakrantíð fyri Liverpool. Hvør er maðurin, sum eisini hevur roynt at skora móti Føroyum?

Svar:

2. Størsta álopsstjørnan hjá Liverpool seinnu árini, er eisini yngsti málskjúttin í søguni hjá felagnum. Hvør er leikarin, sum um vikuskiftið skrivaði undir sáttmála við Real Madrid, har hann fer at hava nummar 11 ár bakinum?

Svar:

3. Ein av størstu hetjunum í Liverpool nakrantíð, var hesin skotski álopsleikarin. Umframt at vera leikari, var hann í 1985-91 venjari í felagnum. Hvør er leikarin, sum í 511 dystum skeyt 172 mál fyri Liverpool?

Svar:

6-MÁLSKJÚTTAR Í LIVERPOOL
Liverpool hevur í mong, mong ár átt nakrar av vandamestu álopsleikarunum í enskum fótbólti, og í dag skulu vit hava nøvnini á trimum teirra.

Navn:

Bústaður:

Telefon:

ATLANTIC AIRWAYS
Sosialurin
MB-TOURS